# eina dós






*- Vit vóru greið yvir, at vit vóru uppi ímóti einum risa, og at tað ikki var nokk at vera skjótari enn hann. Vit máttu vera nógv snildari, sigur Bjarni Askham Bjarnason*



*Saman við Kall vóru tað teir tríggir, Bogi Henriksen, Høgni Rasmussen og Ingi Rasmussen á lýsingarfyritøkuni Sansir, sum fingu hugskotið til "Frælsi í dós"*

originalt. Tí bleiv tað til Kall-kalendaran í sendingini Ódnin, har fólk millum annað kundu luttaka í eini spurnarkapping, har James so handaði vinningarnir á torginum í SMS dagin eftir, greiðir Henny frá. Seinni skipaði Kall fyri enn eini kapping, har fólk sendu privatmyndir inn, og vinnandi myndirnar síðani vóru prentaðar á talutíðarkortini.

– Eitt er at gera eitt nýskapandi lýsingarátak. Men tað má ongantíð blíva so øðrvísi, at fólk ikki kenna seg aftur í tí. Tað stuttliga við myndakappingini var jú, at fólk sóu seg sjálvan ella onkran, tey kendu, aftur á kortunum. Slíkt kanst tú neyvan gera aðrastaðni, men í Føroyum kanst tú, so sjálvandi var tað ein møguleiki, sum skuldi brúkast, sigur Henny

## Hvør av øðrum ...

Samstarvið millum Kall, SMS og Rás2 var uttan iva eitt tað mest vælskipaða dømi uppá "co-branding", vit hava sæð í Føroyum. Co-branding gongur í stuttum út uppá, at fleiri fyritøkur ella merki fáa gagn av tí uppmerksemi, hvør av teimum megnar at skapa.

– Við at flætta tiltøkini í SMS og sendingina í Rás2 saman við "Frælsi í Dós" miðaðu vit sjálvandi ímóti at fáa so nógvar SMS kundar og Rás2 lurtarar, sum gjørligt, til eisini at gerast Kall-kundar. Júst hetta samstarvið var ætlað rættiliga tíðiliga í lýsingarferðini, men co-branding tankin letur beinanvegin upp fyri eini ørgrynnu av øðrum møguleikum, tú als ikki gevur tær far um í byrjanini, sigur Bjarni og avdúkar samstundis, at næstu ferð tú fert í Havnar Bio, átti tú at hugt nærri at pop-korn pakkanum ...

## Ikki skrottað enn

Men um útgangsstøði fyri "Frælsi í Dós" átakinum var, at tey ungu ikki hyggja í sjónvarp, hvussu ber tað so til, at vit júst nú nettupp síggja Frælsi-lýsingar á sjónvarpsskíggjanum?

– Tí tú lærir av tínum royndum allatíðina. Úrslitið av kanningunum av sjónvarpsvanunum hjá teimum ungu hevur víst seg ikki at vera so eintýtt, sum vit fyrst hildu. Hóast tey ungu ikki beinleiðis sita niðri og hyggja at Degi og Viku ella Læknin hevur orðið, so er familjan sum oftast savnað hesa tíðina á kvøldinum. Og alt bendir á, at tey ungu ikki so sjáldan kveita at lýsingunum, tá sjónvarpið allíkavæl er frá, sigur Bjarni, sum ikki dylur yvir, at "Frælsi í Dós" átakið higartil hevur eydnast betri enn nakar tordi at vænta.

– Men fyri tað eru allar súður ikki syftar. At skaffa so nógvar Frælsi-kundar, sum gjørligt, var bara fyrsta stigið á leiðini. Stóra avbjóðingin liggur í at tryggja sær, at teir verða verandi Frælsi-kundar. Um vit framhaldandi fara at brúka dósina at halda uppá teir er óvist, men hon er ikki skrottað enn. Hvør veit, kanska var meir í henni enn vit hildu ... , grunar stjórin á Kalli.